# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Erika Jacobsen 85 ár



Mamma er fødd 28. november 1924 í Haraldssundi, dóttir Mariu norðan úr Húsi í Kunoy og Jákup Joensen, festara úr Kongsstovu á Skarði.

Mamma hevði tvær systrar, Hannumiu, sum var fødd í 1926, og Jonu, sum er fødd í 1932, men hon doyði 1997. Sum vanligt var hjá gentum tá, fór mamma okkara út at tæna. Hon var í Múla, og har róstu tey henni, hvussu røsk hon var.

Og eitt afturat, sum altíð hevði eyðkent hana, er hennara lætta sinnalag. Tað hevur altíð verið lív og kæti, har sum hon hevur verið. Mamma tænti nógv suðuri í Havn, og ikki minst ta tíðina, tá pápi lá sjúkur. Teimum, sum hon tænti hjá, bar hon alt gott og helt á við at hava samband við fleiri teirra.

Mamma og pápi giftust 24. januar 1952 og búðu tey fyrstu trý árini á Oyrarbakka, har dótturin var fødd. Tey fluttu norður til Haraldssund í 1955, og tvey ár seinni fingu tey ein son. Mamma vaskaði skúlan, og tey skuldu syrgja fyri at kynda upp, so tað var heitt, tá børnini komu um morgunin. Tað, sum alt annað arbeiði, varð gjørt við lít.

Mamma fór altíð tíðliga upp, tá hini komu upp, var heitt og hugnaligt at koma inn.

Tíðin broyttist, og fólk fingu heintleikar sum telefon, streym frá SEV og byrging um sundið. Tá arbeiðið fór í gongd við at gera berghol til Kunoyar í 1986, fekk mamma til uppgávu at gera mat til arbeiðsfólkið, sum hon eisini fekk nógv rós fyri.

Mamma og pápi fingu fýra børn, og eg eri yngst av systkjunum. Tann 28. mai 2006 bleiv mamma sjúk. Hon bleiv lamin í vinstru síðu, og nú situr hon í rullistóli. Hálvt ár seinni kom hon at búgva á Røktarheiminum Niðristovu í Klaksvík, og pápi er eisini har hjá henni.

Hervið vil eg takka teimum, sum eru um tey gomlu har. Tey gera eitt stórt arbeiði við at passa upp á tey gomlu.

Vit fýra vilja ynskja mammu okkara tillukku við degnum, sum var leygardagin tann 28. november.

**Andrass Jacobsen**

*Av misgáum hevur hendan føðingardagsheilsanin til Eriku Jacobsen verið burturløgd á redaktiónini. Vit biðja orsaka mistakið.*

*- red*

# MERKISDAGAR

**Gullbrúdleyp**
12. jan. hava hjúnini Magdalena og Jákup Martin Joensen í Oyndarfirði gullbrúlleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Oyndarfirði tann 16. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. hava Guðny Krossteig Mortensen og Eyðfinnur Mortensen, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fyri innbornum á Hotel Føroyum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda vit silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Skálanum í Klaksvík frá kl. 16. Julianna og Olivur Thomsen.

**70 ára føðingardagur**
Tann 28. des. verður Eyðbjørn Lervig Leirvík 70 ár. Føðingardagurin verður hildin sunnudagin 27. des. í bowlinghøllini í Leirvík frá kl. 17.

**70 ára føðingardagur**
Erhard Mortensen 70 ár. Vælkomin í føðingardag! Hósdagin 31. desember 2009 fylli eg 70 ár. Føðingardagurin verður hildin í Posthúskjallaranum í Tórsgøtu millum klokkan 11 - 17, og eru øll hjartaliga vælkomin. Eg gleði meg at síggja tykkum.

**80 ára føðingardagur**
30. des. verður Asta Larsen Tvøroyri 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**85 ára føðingardagur**
Sunnudagin 3. jan. verður Steingrim Joensen, Argjaboðagøta 32, Argir, 85 ár. Dagurin verður hildin í AB-húsinum við fótbóltsvøllin á Argjum sunnudagin 3. jan frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Prógv**
27. okt. 2009 fekk Marita Hansen, Tórshavn, á Keypmannahavnar Universitetið handað prógv sum cand. mag. í málpsykologi. Nevnast kann at hon fekk hægsta próvtal til próvtøkuna.

**Prógv**
27. nov. bleiv Maria Chun Nielsdóttir doktari (PhD) í havfrøði við National Oceanography Centre, University of Southampton í Southampton, Stóra Bretland. Opponentar vóru Prof. Hein de Baar frá Uiversity of Groningen, Royal Netherlands Institute for Sea Research (NIOZ) og Dr. Doug Connelly frá National Oceanography Centre í Southampton.

**Brúdleyp**
Mánadagin 28. des. kl. 15 giftast í Christianskirkjuni Birna Arge og Poul Jóhannes K. Joensen. Veitslan verður fyri innbodnum á Klaksvíkar Sjómansheimið kl. 19.

**Brúdleyp**
Mikudagin 30. des. giftast Anna Mohr Joensen úr Kollafirði og Bjørn Holm úr Djúpadali. Vígslan verður í Dómkirkjuni kl. 17. Brúdleypið verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum aftan á vígsluna.

**Brúdleyp**
Nýggjársdag 1 jan. giftast Svavar Torbjørnson Joensen og Tórun Miðberg. Vígslan verður í Kollafjarðar kirkju kl. 14. Opið hús verður í bygdarhúsinum í Kollafirði frá kl. 15.30-20.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 1. jan. giftast í Fuglafjarðar kirkju kl. 15 Randi Sólsker og Sigfríður Abrahamsen, Eiði. Opið hús verður heima (Gerðisvegur 3) kl. 20 har øll eru vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 2. jan. giftast í Sjóvar kirkju Anna Petersen av Strondum og Pauli G. Hansen av Skála. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 591486/447257 (Anna) ella 594323/441323 (Pauli) innan 15. des.

**Brúdleyp**
Leygardagin 2. jan. kl. 13 giftast í Vesturkirkjuni Rebekka Consuelo Nilssen úr Tórshavn og Símun Petur Eið av Hellunum. Veitsla verður í HB-húsinum kl. 18.30 fyri innbodnum.

**Brúdleyp**
Leygardagin 9. jan. giftast í Fuglafjarðar kirkju Mary-Ann Isaksen og Høgni Zachariassen. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Sunnudagin 10. jan. kl. 18.30 verður brúðarhús á Ennivegi 3 í Fuglafirði. Har hevði tað glett okkum at sæð familju, vinir og kenningar.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum teimum mongu, ið gleddu meg á 90 ára føðingardegi mínum hin 9. oktober – við ynskjum um eini gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.

**Heilsan**
**Lena Petersen, Rituvík**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum mongu, sum við vitjanum, blómum, gávum og uppringingum, gjørdu mær 80 ára dagin so hugnaligan. Tøkk øll somul.

*Eisini vil eg ynskja familju,vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av harranum signað nýggjár.*

**Vinarliga**
**Cederfeldt Olsen, Tvøroyri**

## Andlát og jarðarferðir

Sunnumorgunin andaðist **Anja í Lambanum** á Landssjúkrahúsinum, 33 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum týsdagin kl. 16 til Fuglafjarðar. Jarðarferðin verður úr Siloa mikudagin kl. 14. Tey ið vilja minnast Anju, kunnu lata tónleikabólkinum Ælaboganum eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

Kistan við **Jenny Jacobsen úr Sørvági** fer av Ellis- og røktarheiminum á Sýnini týsdagin kl. 18 í kirkjuna. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini.

**Petur Jacobsen, Tórshavn, vanliga Petur hjá Sjeddik,** andaðist sunnudagin, 69 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum 1. jóladag kl. 19. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju annan jóladag kl. 13.

**Torbein Rein, ættaður úr Havn, búsitandi á Argjum,** andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 69 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapelinum týsdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 13.

## Dagurin

**22. desember. Japetus.** Ókent halgimenni, men kanska hevur hann navn eftir Jafeti, soni Nóa. Sólstøður, stytsti dagur.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*